# Løgmaður er vorðin stórriddari

**Anfinn Kallsberg, løgmaður, fekk hósdagin handað hægsta heiðurstekin íslendsku tjóðarinnar. Hann kann nú kalla seg stórriddara við stjørnu**

FORSETAVITJAN
*John Johannessen*



*Forseti Íslands, Ólafur Ragnar Grímsson, útnevnir Føroya Løgmann, Anfinn Kallsberg til stórriddara við stjórnu*

Føroya løgmaður hevur fingið loyvi at bera hægsta heiðurstekinið hjá íslendsku tjóðini.

Hetta hendi, tá íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, á samkomu í Norðurlandahúsinum valdi at heiðra fimm fólk við heiðursteknum í íslendska Falkaordannum.

Anfinn Kallsberg varð tann fyrsti, ið varð kallaður upp til forsetan, har hann fekk um hálsin stóra heiðurstekinið, ið ger hann til stórriddara við stjørnu í íslendska Falkaordannum.

Ólafur Ragnar Grímsson, forseti, segði, at heiðurstekinið skuldi fatast sum ein staðfesting av samstarvinum millum Ísland og Føroyar.

## Fimm riddarar

Íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, valdi at heiðra fimm fólk við heiðursteknum íslendsku tjóðarinnar. Afturat løgmanni fingu Poul Mohr, íslendskur konsul í Føroyum, Jóhan Hendrik Wither Poulsen, professari, og Turid Sigurdardóttir, lektari, handað heiðurstekin.

Poul Mohr varð útnevndur stórriddari uttan stjórnu, sum er næsthægsta heiðurstekinið í Falkaordannum. Og afturat honum fingu Jóhan Hendrik Wither Poulsen, professari og Turid Sigurðardóttir, lektari, vanligan riddarakross av Falkaordannum fyri arbeiði teirra við norrønum máli.

## FAKTABOKS

### Trý sløg av heiðursteknum

Heiðúrstekin íslendsku tjóðarinnar verður nevnt Falkurin ella Íslandsfalkurin.

Falkurin verður latin persónum, ið íslendski forsetin metir hava gjørt nakað serligt fyri Ísland, ella sum hava serligan týdning fyri Ísland.

Heiðurstekinið er býtt í tríggjar bólkar. Tað ber til at gerast riddari, stórriddari ella stórriddari við stjórnu. Tann, sum er útnevndur stórriddari við stjórnu ber hægsta heiðurstekin íslendsku tjóðarinnar.



*Íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson og frú Dorrit Moussaieff heilsa upp á bygdarráðslimirnar í Gøtu*



*Ólafur Ragnar Grímsson heilsar upp á børnini í Gøtu í gjár*



*Íslendski forsetin Ólafur Ragnar Grímsson og frú Dorrit Moussaieff saman við løgmanshjúnunum umborð á Brimli á veg inn á Skálafjørðin*



*Frú Dorrit Moussaieff heilsar upp á børnini í Runavík*



# Skiftu vert á markinum

**Eftir gomlum íslendskum siðið fekk íslendski forsetin nýggjan vert, tá hann kom á kommunumarkið millum Runavíkar Kommunu og Gøtu Kommunu**

FORSETAVITJAN
*John Johannessen*
*Jens Kristian Vang (myndir)*

**Gøta:**
Tá vitjan Ólaf Ragnar Grímsson í Runavík var av fyrrapartin í gjár, fylgdi Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, honum til kommunumarkið á Gøtueiði, har borgarstjórin í Gøtu, Halldóra Ranghamar, tók við og fylgdi forsetanum víðari í bussinum til Norðagøtu.

Í Norðagøtu varð vitjað í gomlu kirkjuni og gingið í sporum Gøtu Tróndar, og síðani varð farið í nýggju kirkjuna við Gøtugjógv, har Atli Hansen, kirkjuráðsformaður, greiddi frá kirkjuni og sangkórið Gøta-Leirvík sang gamla Kingo lagið »Nú rennur sólin frí« og íslendska sangin »Smávinir Fagrir«.



*Ólafur Ragnar Grímsson takkar Rodmundi Nielsen, borgarstjóra í Runavík, sum var vertur fyri ferðalagnum. Á kommunumarkinum til Gøtu tók Halldóra Ranghamar, sum er bygdarráðsformaður í Gøtu, yvir sum vertur*

# Kunnaðu forsetan um oljuvinnu

**Íslendski forsetin varð kunnaður um oljuvinnu og um leiklutin hjá Atlantic Supply Base í henni, tá hann fyrrapartin fríggjadagin vitjaði í Runavík**

FORSETAVITJAN
*John Johannessen*
*Jens Kristian Vang (myndir)*

Ólafur Ragnar Grímsson, forseti, varð væl kunnaður um eina komandi oljuvinnu í Føroyum, tá hann vitjaði í Runavík fríggjadagin.

Lasse Borðoy, stjóri fyri útgerðarhavnina í Runavík, kunnaði forsetan um væntandi virksemið og um leiklutin hjá Atlantic Supply Base í Runavík í eini komandi oljuvinnu.

## Stór móttøka

Stór móttøka var á bryggjuni í Runavík, tá Brimil um tíggju tíðina fríggjamorgunin legði at við íslendska forsetanum, Ólafi Ragnar Grímsson, umborð.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, tók ímóti forsetanum og dótti borgarstjóran, Mia Nielsen, handaði forsetafrúuni, Dorrit Moussaieff, blómutyssi.

Íslendski forsetin gav sær góðar stundir at heilsa upp á mongu fólkini á bryggjuni, áðrenn hann við fylgi fór í bussin, sum koyrdi hann niðan á kommunuskrivstovuna, har hann skuldi fáa eitt sindur at vita um føroyskt oljuvirksemi.

Uttan fyri kommunuskrivstovuna var somuleiðis stór mannfjøld og fagna forsetanum.

## Fekk horn til gávus

Á samkomuni í kommunuskrivstovuni í Runavík fekk íslendski forsetin eitt snapsaglas gjørt úr horni til gávus frá kommununi, og forsetafrúan fekk silvursmúkkur til føroyska búnan.

Íslendsku blaðmenninir, sum eru við á ferðini í Føroyum, vænta ikki, at íslendski forsetin fer at drekka nógvar snapsir úr føroyska veðrahorninum, tí hann drekkur ikki.



*Íslendski forsetin fekk handað snapsaglas úr føroyskum horni frá Runavíkar Kommunu*